HOFF STOFF

# Mary heilsaði upp á landsmenn

**Mary krúnprinsessa heilsaði í Klaksvík upp á fólk úr Australia, sum eru búsitandi í Føroyum. Kate Sanderson segði seg vóna, at børnini hjá Mary og hinum fólkunum úr Australia, sum búgva í Føroyum og Danmark, fóru at styrkja sambandið millum londini**

HOFF-STOFF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið Mary og Fríðrikur komu í býráðshøllina í Klaksvík beint fyri middag mikudagin, fingu tey høvi at heilsa upp á fólk úr Australia, sum eru búsitandi í Føroyum.

Mary tók sær góðar stundir at tosa við fólkini, spyrja hvaðani tey eru, og hvussu leingi tey høvdu verið í Føroyum.

Kate Sandersen, sum er úr Australia, men hevur búð í nógv ár í Føroyum, helt eina stutta røðu fyri krúnprinsaparinum. Hon segði seg vóna, at børnini hjá Mary og hjá øllum hinum fólkunum úr Australia, sum búgva í Føroyum og Danmark, fóru at styrkja sambandið millum londini.

– Vit eru ikki so nógv úr Australia, sum búgva í Føroyum, men vit eru ein lítil koloni, og helst eru tað fleiri føroyingar, sum búgva í Australia, enn fólk úr Australia, sum búgva í Føroyum, segði Kate Sanderson millum annað í røðuni.



*Mary krúnprinsessa heilsar upp á fólk úr Australia, sum búgva í Føroyum, og teirra familjur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*


SKEMMAN

SØKIR HANDILSLÆRLING

**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar fyrimunir!**

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 650 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingurin skal byrja 1. september.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn innan 9. juli til:

SKEMMAN

Staravegur 7 · Postboks 3278 ·110 Tórshavn
Tel.315588 · Mail: skemman@skemman.fo

Sosialurin 341800


# Smílini vóru stór á Viðareiði

**Krúnprinsaparið fekk ein hátíðarliga móttøku, tá ið tey vitjaðu á Viðareiði fyrrapartin mikudagin. Tey vitjaðu í kirkjuni og í prestagarðinum**

HOFF-STOFF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** Børn og vaksin bíðaðu spent í túninum uttan fyri gamla skúlan á Viðareiði fyrrapartin mikudagin.

Unga parið á kongaligu vitjanini í Føryum skuldi koma til bygdina, og tá ið bilafylgið við teimum rullaði oman móti gamla skúlanum, vóru smílini stór. Børn og vaksin við smáum fløggum tóku ímóti, og sjálvandi vóru tað eisini blómur til tey kongaligu.



*Mary heilsar upp á bygdarfólkið á Viðareiði*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

### Í kirkjuni og á prestagarðinum

Mary og Fríðrikur heilsaðu upp á bygdaráðið og teirra makar, og síðani gekk leiðin yvir í kirkjuna, har prestur greiddi teimum frá. Síðani leiddi prestur tey kongaligu yvir í prestagarðinum, har tey hugdu seg um, áðrenn tey fingu eitt lætt ábit í gomlu roykstovuni.

Inni í roykstovuni greiddi Elsa Funding frá um, hvussu tey búðu á prestagarðinum í gomlum døgum, og Fríðrikur vildi eisini vita, um bygdafólk plagdu at savnast í roykstovuni.

Elsa Funding greiddi frá, at prestagarðurin í gomlum døgum eisini var ein bóndagarður, og tí var nógv húsfólk har.



*Tey kongaligu koma úr kirkjuni og eru á veg yvir í prestagarðin*




*Mary og Fríðrikur undir heiðursportrinum, sum tey á Viðareiði høvdu gjørt teimum*

## Jóansøkubál í Funningsfirði

Fríggjakvøldið 24. juni verður Jóansøkubál á bryggjuni í Funningsfirði.

Byrjað verður kl 22, har Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin.

Á skránni verður m. a. felagssangur og bryggjudansur. Eisini verður høvið at grilla á staðnum og keypa sær okkurt drekkandi afturvið.

Bygdarfólkið í Funningsfirði bjóðar øllum at vera vælkomnum til Jóansøkubálið.